## DAGSINS MEINING

# Áhugavert alternativ

Tað hevur verið ført fram í pressuni, at valstríðið er tamt og uttan nakað serligt innihald. Hesum eru vit ikki samd í. Vit halda, at nógv nýtt og mangan áhugavert er komið fram í valstríðnum. Flokkar hava broytt ideologiska kós og royna seg á økjum, har teir áður hildu seg langt burtur. Eisini má ásannast, at ideologisku vøtnini hava skilt seg meira enn vanligt hevur verið í føroyskum valstríðum. Vit kunnu nevna sum dømi, at átrúnaðarligir og etiskir spurningar eru komin inn. Um hetta hevur hækkað støðið er ivasamt, men hinvegin er jú talan um spurningar, sum vit ikki sleppa undan at taka støðu til. Vit loyva okkum at halda, at flestu flokkar uttan Miðflokkurin hava taklað hesar spurningar við tí álvara, sum hesir spurningar hava uppiborið. Hinvegin slepst illa undan varhuganum av, at Miðflokkurin hevur havt lyndi til at taka sær patent uppá etisk og átrúnaðarlig virði, sum vit øll deila, men sum vit ikki bera uttan á okkum.

Javnaðarflokkurin hevur borið nøkur áhugavert hugskot fram undir valstríðnum. Eitt nú hevur flokkurin lovað at gera nakað við fólkaheilsuna og í hesum sambandi at seta inn, har tað munar mest, nevniliga hjá børnunum. Til tess at tryggja at øll børn fáa heilsugóðan kost og ikki bara búkfyllu, skullu øll børn fáa eina sunna og góða máltíð í skúlanum. Hartil skulu øll dagliga fáa mjólk í skúlunum. Skúlamatur er vanligur í øllum okkara grannalondum og har hevur ein sera góðar royndir við hesum tiltaki. Hetta eigur avgjørt at verða roynt her hjá okkum eisini. Tað, sum hetta kostar, kemur fleiri ferð afur við betri heilsu seinni í lívinum. Eisini er hetta etiskt og menniskjansligt rætt og neyðugt. Tá samfelagið pressar foreldrini so hart, sum nú verður gjørt, hevur samfelagið skyldu at hjálpa børnum eins og foreldrum. Vónandi fara allir flokkar at taka undir við hesum.

Eitt huskot, sum snýr seg um nakað heilt annað, er uppskotið um eina strategi fyri vinnu- og búskaparpolitikkinum og í hesum høpi uppskotið um ein fiskidagabanka. Hetta er eitt sera áhugavert uppskot, ið kann tryggja ungum og nýggjum kreftum møguleikar at sleppa framat í fiskivinnuni og hetta kann tryggja stabilar karmar um vinnuna sum heild. Eitt er at fara inn við studningi sum í gomlum døgum, annað er at sita hendur í favn, meðan alt rapar og arbeiðsloysið aftur fer at herja landið. Javnaðarflokkurin hevur eitt triðja boð, eina vinnulívstrategi, sum kann fyribyrgja, at vit aftur enda í tí stórkreppu, sum vit nú tíverri stevna beint í móti, uttan at nakar rættir hond frá síðu.

Politikkur Javnaðarflokksins er tískil eitt sera áhugavert alternativ til tann politikk, ið hevur verið rikin seinastu fimm-seks árini. Hesin politikkur hevur alt samfelagið sum mál og ikki bert ein part av samfelagnum. Hesin politikkur miðar í móti eini tjóðskaparligari semju, samstundis sum vælferðarsamfelagið verður varðveitt og útbygt. Hetta er eitt áhugavert alternativ til ein politikk, sum hevur elvt til, at vit hava rent okkum føst á fleiri týðandi samfelagsøkjum. Men alstóran týdning hevur tað at fáa virðingina fyri hvørjum øðrum og samstarvið inn í aftur politikkin. Bert við teimum byggja vit land.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hálvføroyskt - hálvdanskt og fremmandahatur

**Sigfríður Olsen**



Sjálvan valdagin fyri skjótt tveimum árum síðan gav Tjóðveldisflokkurin út eina vallýsing, har føroyska tjóðin á ein vanvirðisligan hátt varð býtt upp í tríggjar partar:

**Hálvdansk - hálvføroyskt - føroyskt.**

Á ymiskan hátt hevur Tjóðveldisflokkurin síðan roynt at vaska hendur, men hevur tað gingið so sum so við tí. Vit »hálvføroysku« eru í hvussu er púra samd við Katrini Dahl Jacobsen, at henda lýsing ikki bert minnir á, men harafturímóti er ein beinleiðis endurgeving av tí hugsjón, ein ávís fólkarørsla spýði úr sær í 30-unum.

Aftur til hetta valið verður hesin táttur tikin uppaftur. Nú av framsøgumanni Fólkafloksins í Andglettinum. Og ikki var tað tespiligt at hoyra.

Men hesuferð var tað ikki **bara** Óli, men sjálvur talsmaðurin fyri Hin føroyska Fólkaflokkin (radikalt sjálvstýri), ið úttalaði seg. Óhugnaligur boðskapur, kunna vit bert staðfesta.

Latið okkum tí halda fram við at stremba fram móti tí GÓÐA SAMFELAGNUM, tí har missa slíkar ódámligar hugsjónir gróðrarlíkindini.

Týsdagin 20. januar og tey komandi fýra árini hava vit møguleikan til tað!!!

Gott val.

# Her má vend koma í…

**Levi Mørk**

Rapp, C- vitaminur og planbúskapur í Suðuroynni!

Tað skal ivaleyst meira til enn at rappa og C- vitaminur til fyri at fáa planbúskapin og blandingsøkonomi hjá Javnarflokkinum í Suðuroynni til at virka. Tað skal ivaleyst nýggj andlit, ið hava skil fyri búskaparligu og fíggjarstøðuni í Suðuroynni?

Serliga um vit hugsa um tað stóra arbeiðsloysið í sunnara helvt av Suðuroynni. Tú kanst ikki bara liva av planbúskapinum, við at rappa og eta C- vitamunur. Boðskapurin má verða nýggir persónar, sum vilja Javnarflokkinum og Suðuroynni tað besta. Hvør ið kemur inn Jóaness, Henrik, Sverri, Mikkjal ella Nita er upp til veljaran, men her eri eg samdur við Kristian Magnussen og Jóannes v. m. at her má vend koma í.....

# Gloymið ikki tey apopleksiraktu eftir 20. januar!

TÍÐINDASKRIV
*Heilafelagið*



Heilafelagið vil við hesum minna tykkum politikarar á úrslitið av kanningini, sum Heilafelagið lat gera í 2003, Ár teirra brekaðu. Kanningin er um viðurskiftini hjá apopleksiraktum í Føroyum.

Kanningin vísir:
- Apopleksirakt í Føroyum koma ikki eins væl fyri seg, sum apopleksirakt í Danmark.
- Ov fá verða innløgd nóg skjótt á apopleksideildina á Landssjúkrahúsinum.
- Apopleksirakt fáa als ikki nóg góð tilboð um uppvenjing og eftirviðgerð.
- Samskiftið millum heilsuverkið og almannaverkið er ikki nóg gott.
- Tænastur frá Almannastovuni eru ikki nóg góðar.
- Ov fá apopleksirakt koma ígongd aftur við arbeiði og frítíðarítriv.
- Apopleksirakt eru sosialt avbyrgd.

Heilafelagið vil heita á tykkum, sum fara at stýra okkara landið aftaná 20. januar, at minnast til kanningina og arbeiða fyri at bøta um viðurskiftini hjá apopleksiraktum, so eisini tey fáa eitt virðuligt lív. Minnist til, at í Føroyum verða uml. 100 fólk um árið rakt av apopleksi.

Gott val!

P.s. Kanningin kann útvegast frá Heilafelagnum, Íslandsvegur 10 C, tlf. 321520, e-mail: heilaf@post.olivant.fo


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.





# Samstarv er loysnin

## Hesi eru valevnini hjá Sambandsflokkinum

Erika Elttør

Norðoyggjar

Reimund Langgaard

Eysturoy

Bárður Nielsen

Norðurstreymoy

Olav Enomoto

Norðurstreymoy

Karina Fagralón

Norðurstreymoy

Gunnar Nattestad

Vágar

Michael Jensen

Suðurstreymoy

Jóhan Petur Johannesen

Suðurstreymoy

Eydna Vidtfeldt

Sandoy

Sambandsflokkurin
www.samband.fo